## Bóklingur um skatt

Grannskoðanarfyritøkan, SPEKT, hevur seinnu árini givið út dagførdan bókling um skatt. Bóklingurin er sjálvandi ikki nøkur fullkomin gjøgnumgongd av føroysku skattaviðurskiftum, men í nógvar mátar heldur eitt hent uppslagsverk, tá vanligir skattaspurningar skulu svarast.

Nú er »Eitt sindur um skatt 2006« send kundum og viðskiftafólkum hjá fyritøkuni annars. Og í aðrar mátar ber eisini til hjá øllum øðrum at taka bóklingin niður av heimasíðu felagsins.

-mørk

## Oljan á virðisbrævamarknaðin

4. apríl verður vártingið hjá Oljutinginum sett á Sjómansskúlanum í Havn. Yvirskriftin á hesi tingsetuni verður gongdin og menningin hjá teimum báðum føroysku oljufeløgunum, sum hvør í sínum lagi eru skrásett á tveimum ymsum marknaðum.

Á vártinginum fara stjórarnir hjá teimum báðum feløgunum at greiða frá endamáli, vakstrarstrategi, fígging og og øðrum viðkomandi hugtøkum. Áhoyrararnir fáa sjálvandi høvi at seta spurningar í hesum sambandi.

Seinni fer Jan Jakobsen, fíggjarleiðari í Føroya Banka, at greiða frá um íløgur í virðisbrøv.

-mørk

## 18 kvinnur á Kreppumiðstøðini

Í 2005 hava 18 kvinnur við til samans 24 børnum gist á Kreppumiðstøðini í Havn. Síðani Kvinnuhúsið fór undir hetta virksemið í 1990, hava íalt 234 kvinnur og 233 gist her. Talan er um kvinnur og børn, sum hava verið fyri sálarligum og/ella likamligum harðskapi, og talið av áheitanum, sum Kvinnuhúsið fær, hevur verið stórt. Bara í 2005 vóru 423 áheitanir.

Tað er Kvinnufelagið, sum rekur Kvinnuhúsið og Kreppumiðstøðina, og er raksturin av hesum grundaður á sjálvbodna arbeiðsmegi.

Fyri stuttum hevði nevndin í felagnum aðalfund. Í nevndini sita nú Eyrith Leyni, forkvinna, Masa Christiansen, næstforkvinna, Sigrun Samuelsen, kassameistari, Ása Olsen og Dasy Sloan.

-mørk

# Streymoyggin broytir rúsdrekkalógina

**Sambært spurnarumfari, sum Sosialurin hevur gjørt millum tingfólki, verða ætlaðu dagføringarnar av rúsdrekkalógini gjøgnumførdar. 20 tingfólk atkvøða fyri broytingini - av hesum 12 úr Streymoynni**

RÚSDREKKALÓGIN
*Jákup Mørk/Rigmor Dam*
*jakup@sosialurin.fo*




*Rúsdrekkalógin verður eftir øllum at døma linkað, soleiðis at skeinkjast kann til størri tiltøk. Men roknast skal ikki við, at øl, vín ella rúsdrekka finnur vegin fram til handsilshillarnar í bræði*
*Mynd: Alvin E. Andersen*

Tá ymsu festivalarnir í summar fara av bakkastokki, verður tað eftir øllum at døma eisini við uttandura barrum, har tey vitjandi fáa møguleika at keypa sær eina bjór. Tað hava tey kanska eisini havt áður, men hesa ferð verður tað fult lógligt.

Tað tykist nevnliga vera vist, at ætlaða broytingin – ella dagføringin – hjá Bjarna Djurholm av rúsdrekkalógini vinnur frama, tá atkvøðast skal um málið, sum nú liggur í nevnd.

### Liberala suðurstreymoy

Sosialurin hevur hevur verið í samband við tey 32, sum í dag manna løgtingið, og av hesum siga 20 seg vera fyri ætlaðu broytingunum. Níggju tinglimir siga seg vera ímóti broytingini, meðan tríggir tinglimir siga seg onga viðmerking hava til málið í løtuni.

Verður býtið seg upp landafrøðiliga, so stendur rimmarfast, at tað fyrst og fremst er Streymoyggin, sum tykist ynskja broytingarnar. Verða eykavaldu løgtingslimirnir roknaði við, eigur Streymoyggin 13 atkvøður, og av hesum er bert ein, sum sigur seg vera ímóti uppskotinum.

Aðra staðni kring landið er støðutakanin til málið rættiliga ymisk, eins og hon eisini tykist vera tað innanfloks. Flestu flokkara hava siðvenju fyri, at hvør tingmaður atkvøður eftir egnari sannføring í slíkum málum, og talan er tí óvæntað um spjaddar fatanir av málinum. Einasti flokkurin, sum púrasta greitt tykist vera fyri ætlaðu broytingunum, er Tjóðveldisflokkurin. Har siga sjey av átta tinglimum seg vera fyri hesum.

### Ikki á hillarnar

Spurningurin um at fáa øl, vín – og kanska eisini sterkari løg – á handilshillarnar, hevur eisini verið reistur seinastu tíðina.

Men her tykjast løgtingsmenn hava eina rættiliga greiða støðu til spurningin. Tíggju løgtingsmenn siga seg vera fyri, at øl og vín skal koma á handilshillarnar, meðan bara tríggir siga ja til at hetta eisini skal umfata rúsdrekka.

Hinvegin er heldur ikki meiriluti fyri, at rúsdrekkalógin skal herðast. Bara fýra løgtingslimir siga vilja atkvøða fyri slíkum uppskoti.

## FAKTA

**Spurningarnir**

Tey 32 tingfólkini hava fingið hesar fýra spurningar:

1 Skal tað verða loyvt at selja øl, vín og rúsdrekka í handlunum
2 Skal tað verða loyvt at selja øl og vín í handlunum
3 Skal tað verða loyvt at selja øl til størri tiltøk
4 Skal rúsdrekkalógin herðast

**Soleiðis svaraðu tey**

| | ja | nei | onga viðm. |
|---|---|---|---|
| Øl, vín og rúsdrekka í handlar | 3 | 24 | 5 |
| Øl og vín í handlar | 10 | 18 | 4 |
| Øl til størri tiltøk | 20 | 9 | 3 |
| Herd rúsdrekkalóggáva | 4 | 24 | 4 |

# Ongin slingur í valsinum

**Í gjárkvøldið høvdu fakfeløgini kreppufund og har varð staðfest, at tey ætla at seta hart ímóti hørðum ímóti løgtinginum og landsstýrinum**

ALS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Eftir at flestu fakfeløg í landinum hittust á fundi í gjárkvøldið, er full semja um, at vit fara ikki at góðtaka, at ALS verður avtikið og lagt undir politisku skipanina, sigur Ingeborg Vinther*

– Vit ætla ikki at slaka.

Ingeborg Vinther sigur, at tað var ongin slingur í valsinum, tá ið flestu fakfeløgini í landinum hittust á kreppufundi í gjárkvøldið.

Á fundinum viðgjørdi tey ætlanina hjá politiska valdinum at avtaka bæði ALS og Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin og at leggja báðar skipanirnar beinleiðis undir fíggjarlógina hjá Løgtinginum.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at hetta er eitt mál, sum bæði fakfeløg og arbeiðsgevarar taka í størsta álvara og her er fyri einaferð skyld eitt mál, har bæði fakfeløg og arbeiðsgevarar eru fullkomiliga samd og draga eina línu.

### Góðtaka ikki ætlanina

Ingeborg Vinther sigur, at hetta er eitt mál, sum fakfeløgini taka í allar størsta álvara og tí avgjørdu tey at hittast á fundi í gjárkvøldið at viðgerða støðuna.

Hon sigur, at tey flestu av fakfeløgunum vórðu umboðað á fundinum.

Og hon sigur, at fakfeløgini eru púra samd um, at tey fara ikki at góðtaka, at løgtingið gjøgnumførir ætlanina.

-Vit eru púra samd um, at hvørki ALS, Samhaldsfasti ella Frítíðargrunnurin, skulu takast av og leggjast á fíggjarlógina.

Hon leggur afturat, at fakfeløgini eru púra samd um, at tær skipanir, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir rinda, skulu.

– Har partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir gjalda, skulu teir eisini valda, leggur hon afturat.

Ingeborg Vinther sigur, at fakfeløgini fara nú at biðja um fund við nevndina hjá Løgtinginum, sum viðger málið víðari.

Hon sigur, at fakfeløgini hava ikki tosað um, hvat skal henda, halda landsstýri og løgting fast við ætlanina at leggja grunnarnir, sum arbeiðsmarknaðurin umsitur, undir fíggjarlógina.

– Men vit eru samd um, at halda løgting og landsstýri fast við ætlanina, skulu fakfeløgini hittast aftur at tosa um, hvat so skal gerast.

Hon sigur, at í hesum liggur, at fakfeløgini eru ikki sinnað at sleppa málinum og at tey eru sinnað at gera tað, sum neyðugt er, fyri at forða fyri at ALS, Samhaldsfasti og aðrir grunnar hjá arbeiðsmarknaðinum, verða ognartiknir.

Sí meiri á síðu 5.